Summarstevnur og studentahúgvur

Nor›oyastevnan var› um vikuskifti› hildin í Klaksvík. Hend stevnan er fyri mong eitt prógv um at summari› er byrja›. Eitt, i› ey›kennir fleiri av okkara summarstevnum eru n‡klæktu pisurnar, sum vi› sínum húgvum seta eitt serligt dæmi á summar stevnurnar. Enn eru tær fyrstu pisurnar ikki klæktar. Nú, fyrstu dagarnir av Juni mána›a eru farnir afturum, kann ta› ikki vera langt til ta› fyrstu studentarnir fáa húgvuna setta á høvdi›.

Á›renn tey flestu komu so langt sum at fara í studentarskúla, er ney›ugt at hava eina grund at byggja á. Henda grund er fyri tey flestu tann føroyski fólkaskúlin. Ta› eru tó tey í royna a›rar lei›ir. Seinnu árini er ta› vori› allsamt meiri vanligt at fara av landinum, at taka tey seinastu árini av fólkaskúlanum. Fyri nøkrum árum sí›ani, var fari› undir at halda føroyskan eftirskúla í Genner, hesin bleiv seinni fluttur til Hygum, men er nú av vantandi undirtøku ni›urlagdur. Ta› vóru tó ikki øll sum fóru á eftirskúla, sum valdu tann føroyska.

Í vikuskitinum var› skipa› fyri kunnandi fundum kring landi›, um Hedemølle Efterskole, sum er eitt alternativ til at taka 8. -9. og 10. flokk í Føroyum. Vit hyggja eitt sindur nærri at hesum skúla.

Seinasta umfari› í kappingini um ársins songrødd var eisini hildi› í vikuskiftinum, og á›renn finaluna, sum eftir ætlan, ver›ur hildina komandi vikuskifti, draga vit saman um kappingina.

Iron Maiden er ein av teimum mest tí›andi bólkunum innan rokktónleikin í Bretlandi tey seinastu gott 20. árini. Í samband vi› n‡ggju útgávuna hjá bólkinum, hava vit hugt eitt sindur nærri eftir søguni hjá bólkinum.

Eftir er bert at ynskja øllum ein gó›an mikudag, og ta› er hervi› gjørt

Send inn og vinn

3 arin

letur eina fløgu um vikuna til teg, sum hevur besta innslagi› í Yngd.

Vinn eina fløgu

Nú gevur Yngd tær eisini møguleikan at vinna onkra av nýggjastu fløgunum, sum eru á marknaðinum. Fyri at lesararnir eisini skulu hava høvi at koma fram at, hava vit sjálvsagt rúm fyri einum brævkassa, har lesararnir fáa høvi til at siga sína hugsan um líkt og ólíkt.

Hevur tú eina yrking, eitt hjartasuff um okkurt, ella ein spurning til Yngd ella okkurt heilt annað, so er bara at finna pennin ella telduna fram, og skriva til okkum. Antin til Sosialurin postboks 76, 110 Tórshavn, merk brævbjálvan „Yngd“. Ella send okkum teldupost á yngd@sosialurin.fo

Hvørja viku verður so drigið lut ímillum innkomnu brøvini, og vinnarin fær eina spildurnýggja fløgu sendandi frá 3‘aranum í SMS. Fyri at eingin skal smæðast burtur, seta vit onga treyt um at innkomið tilfar verður undirskrivað við fullum navni. Navn og bústaður eiga tó verða upplýst til Yngd, soleiðis at vit vita, hvar ein møgulig fløga skal sendast.

Yngd SOSIALURIN

Tí›indabla›i› Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn
Tlf: 311820
Fax: 314720
Teldupostur:
yngd@sosialurin.fo

Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller

Bla›stjórn:
Fró›i Løkságar›

Uppseting:
Karis Olsen

Yngd er ein partur av Sosialinum mikudag. Evstamark er á middegi fríggjadag

Les Yngd í Sosialinum hvønn mikudag

Ein ø›rvísi møguleiki

Altsamt fleiri ung fólk velja at fara til Danmarkar á eftirskúla. Í vikuskiftinum vóru umbo› fyri danskan eftirskúla í Føroyum og hildu kunnandi fundir



Í vikuskiftinum vóru kunnandi fundir runt landi› um Hedemølle Efterskole. Ta› er tann evangeliska lutheranska missiónin, sum eigur skúlan. Talan er tískil um ein kristnan eftirskúla. Skúlin liggur í Jútlandi, nøkulunda mi›skei›is ímillum Viborg og Randers, rættari sagt í Bjerringbro.

Tvey umbo› fyri skúlan vóru í Føroyum í vikuskiftinum og kunna›u næmingar, foreldur og onnur áhuga›i. Ta› vóru teir bá›ir Jens Dam, skúlastjóri, og Knud W. Skov, sum er cand. teol, og hevur tilkn‡ti til Dansk Bibel Institut í Keypmannahavn sum vóru í Føroyum fyri skúlan.

Teir bá›ir høvdu fundir fleiri sta›ir runt landi›, millum anna› vóru teir í Havn, Vestmanna og Klaksvík, har teir eisini hildu møtir.

Á skúlanum ber til at taka 8.- 9. og 10. flokk. 10 lærarar eru fast kn‡ttir at skúlanum umframat at nakrir tímalærarar eisini hava sína dagligu gongd á skúlanum.

Í endamálsor›inini fyri skúlan ver›ur sagt at skúlin byggir sítt virksemi á ta› trúgv og sannføring ,at Bíblian, øll sum hon er, er íblást av Gu›i, at hon er hansara óvikandi or›, og einasta og seinasta avger› í øllum spurningum, og ivamálum í samband vi› kristna trúgv. Hetta byggir skúlin sína undirvísing á, hvørs endamál er at menna tann einstaka næmingin bæ›i bókliga, og handaliga, umframt at gle›ibo›skapurin eisini ver›ur bo›a›ur fyri einstøkum næmingi.

Á skúlanum ver›ur undirvíst í øllum teimum kravdu lærugreinunum, umframt at fitt av vællærugreinum eisini eru at velja ímillum, vi› serligum denti løgdum á skapandi og tónlistarligar lærugreinir. Eisini er møguleiki fyri ymiskum ítrottarligum aktiviteti.

Gerandisdagurin á skúlanum er merktur av nógvum bókligum tímum, umframt nøkrum handaligum. Um kvøldarnar ver›a skúlating gjørd á kømrumum, har lærarnir rætta eina hjálpandi hond.

Hvør dagur á skúlanum byrjar og endar eisini vi› eini andakt. Stórur dentur ver›ur eisini lagdur á lærugreinina kristni, sum er b‡tt í tveir partar, nevniliga trúarlæru og og bíbliukunnleika. Sunnudagar fara næmingarnir í kirkju ella á møti í missiónshúsinum saman vi› lærarunum. Av tí sama er kristnibo›anin ein vanligur partur av skúlagongdini.

Skúlin hevur havt fleiri føroyskar næmingar, og teimum hevur øllum dámt rættuliga væl á skúlanum. Í eini grein í bla›num hjá skúlanum, sum er millum kunnandi tilfari›, i› sent er mi›lunum, er samrø›a vi› føroysk foreldur. Tvær av døtrum teirra hava gingi› á skúlanum -Vit hava veri› rættuliga gla› fyri skúlan, og vit vita eisini at døtrar okkara hava havt nógvar gó›ar løtur á skúlanum, sum tær seint fara at gloyma.

Eisini eru tær búna›ar á skúlanum, solei›is at tær eru klárar at møta framtí›ini, og teimum avbjó›ingum í liggja í henni.

Ta› er ikki ókeypis at senda næmingar á ein slíkan privatan skúla. Foreldrini, ella tey avvarandi, noy›ast at gjalda eitt fast gjald fyri hvørja viku. Tó ve›ur ein partur av hesum endurgoldi› av statinum, alt eftir hvussu stóra inntøku tey hava. Eisini letur kommunan ein ávísan stu›ul.